# Nýtt fakfelagssamstarv

## Sjey smærri fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum hava gjørt samstarvsavtalu

Randi Jacobsen

Einaferð vóru fimm smærri fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum, sum samstarvaðu, og tey høvdu eisini felags samráðingar.

Nú er talið sjey, sum samstarva, men tey ætla ikki at samráðast í felag.

Tey sjey feløgini eru Almanna- og heilsurøktarafelagið, Bioanalytikarafelagið, Ergoterapifelagið, Fysioterapeutfelag Føroya, Føroya Psykiatrifelag, Kostog føðslufelag Føroya og Ljósmøðrafelag Føroya.

Samanlagt hava tey stívliga 600 limir.

– Vit ætla millum annað saman at viðgera viðkomandi samfelagsmál og gera viðmerkingar. Vit kunnu senda út felgs yvirlýsing og annað, sigur Majbritt Mohr, forkvinna í Almanna- og heilsurøktarafelagnum.

Tær hugsa sær at halda skeið fyri øllum limunum saman, og menna álitisfólkini við at hava felags álitisfólkaskeið, tí limirnir í ymsu feløgunum eru í fleiri førum á sama arbeiðsplássi.

Sum nevnt verða ikki felags samráðingar, men ætlanin er regluliga at hava felags fundir fyri at kunna limirnar í feløgunum. Feløgini mugu vita, hvat eitt felag ger, eisini fyri at fyri at fyribyrgja, at feløgini ikki verða sett upp móti hvør øðrum. Samstarvið verður eitt netverk, har eisini limirnir fáa høvi at tosa meira saman.

Tær fara somuleiðis at samstarva, tá ið umboð skulu veljast í nevndir og ráð.

### Samstarv loysir seg

Feløgini halda, at við samstarvinum kunnu tey spara bæði tíð og pening.



*Tað eru mest kvinnur í teimum sjey feløgunum, sum nú hava sett orð á sítt samstarv*

Sáttmálarnir hjá feløgunum gingu út 1. oktober, men enn hevur einki av hesum sjey feløgunum fingið fundarboð frá Fíggjarmálaráðnum, men tey bóðu um fund við Fíggjarmálaráðið í dag, tí tey høvdu ymsar spurningar viðvíkjandi sáttmálasamráðingunum.

Hesi sjey fakfeløgini stuðla teimum, sum eru farin í gongd við samráðingar. Tey eru samd við hinum feløgunum á almenna arbeiðsmarknaðinum, at tey vilja hava meira í løn.

– Vit átala eisini, at fyrsta útspælið hjá Fíggjarmálaráðnum var ein 0-loysn, tí tá eru tað ikki frælsar samráðingar, sigur Majbritt Mohr.

Feløgini hava ilt við at góðtaka, at leisturin fyri teirra samráðingar enn ikki er lagdur. Higartil í ár hava tey nevniliga brúkt nógva tíð uppá at leggja tilrættis komandi sáttmálasamráðingar.

Við einum undataki eru forkvinnurnar óløntar og arbeiða fulla tíð.

– Vit kunnu ikki bara leypa avstað við stuttum varsli til samráðingar. Vit mugu biðja okkum frí og mugu tí hava eitt skotbrá.

Tær undrast eisini yvir, at summi feløg ikki hava fingið so frægt sum eitt svar frá Fíggjarmálaráðnum uppá, at sáttmálarnir eru uppsagdir.

# Stjørnan handar kekkin

**Í hálvleikinum sunnudagin, tá ið Stjørnan og VB spæla í Klaksvík, fær Krabbameinafelagið handað kekkin við peninginum til »Stuðlið bróstunum«**

Tá ið Stjørnan og Kyndil herfyri spældu, var dysturin samstundis eitt tiltak til frama fyri "Stuðlið bróstunum".

Tiltakið gav umleið 60.000 krónur.

Sunnudagin spælir Stjørnan móti VB í Klaksvík, og í hálvleikinum er ætlanin at handa Krabbameinsfelagnum kekkin við tí stóru gávuni, sum fer til bróstkrabbagranskingina í Føroyum.

Jákup N. Olsen hevur áður sagt, at handanin í sær sjálvum eisini er eitt upplýsandi tiltak.

rj

# Sjavskapping í Vági

Leygardagin 27. november klokkan 17 verður sjavskapping í VB-húsinum í Vági.

FC Suðuroy skipar fyri kappingini.

Fyri at luttaka krevst tilmelding hjá Páll Lervig á tlf. 373036/254931 ella hjá Torgerð í Lágabø á tlf. 272667 í seinasta lagi fríggjakvøldið kl. 22.00. Tað ber eisini til at tekna seg hóskvøldið í VB-húsinum, tá ið sjavskvøld verður.

Lutaseðlar verða eisini seldir, og tað verða fleiri góðir vinningar, m.a. fartelefon, gávubrøv, karamellur og dunnur.

rj

# Vit hava ikki brúk fyri blokkpolitikki

Áki Bertholdsen



*Heldur enn at arbeiða í blokkum, skulu vit byggja brýr, sigur løgmaður*

– Tað er eitt vánaligt hugskot at fara undir blokkpolitikk í Føroyum.

Tað heldur Kaj Leo Johannesen, løgmaður.

Spurningurin um at skipa blokkar í føroyskum politikki hevur verið stórmál alla vikuna síðani Jóannes Eidesgaard reisti spurningin á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið.

Hann helt, at longu uppundir eitt løgtingsval eiga politiskir flokkar, sum hava nakað at samstarva um, at gera eina avtalu um, hvør politikkurin skal vera, fáa hesir flokkarnir meirilutan.

Hann metti, at hetta fer at gera tað greiðari hjá veljarunum at taka støðu, tí sum støðan er nú, veit veljarin ikki fyri valið, hvønn politikk, hann fær eftir valið, sama hvørjum flokki, hann atkvøður fyri.

Men ein, sum ikki er samdur, er Løgmaður, Kaj Leo Johannesen.

Tað er altíð neyðugt hjá politiskum flokkum at gera semjur tvørtur um floksmørk, eisini tá ið tú ert í einum blokki.

Men heldur enn at samstarva í blokkum, haldi eg, at tað er ein betri máti at byggja brýr ímillum flokkar alla tíðina.

Hann er heldur ikki samdur í, at við blokki, fær veljarin eina betri peiling av, hvat hann fær fyri atkvøðugreiðsluna.

– Ein veljari hjá Sambandsflokkinum hevur altíð eina rættiliga greiða fatan av, hvat hann fær fyri atkvøðuna, bæði hvat fíggjarpolitikki og sosialpolitikki viðvíkur, staðfestir løgmaður.

Sambandsveljarar hava ikki tørv á einum blokki fyri at fáa sambandspolitikk, leggur hann afturat.

– Okkara veljarar vita, at Sambandsflokkurin berjir fyri einum stekrum ríkisfelagsskapi, men tað er meiri enn tey, sum velja fleiri av hinum flokkunum, vita, sigur Kaj Leo Johannesen.